NORÐURLANDAHÚSIÐ

Tiltøk í mars 2003

Leygardagur 01. **kl. 14.00**
Álendsk fotoframsýning letur upp. Myndirnar eru við evnum frá krígnum í Bosnia

Mánadagur 03. **kl. 19.30**
Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir »Við orku og fragd – á ferð« Knud Erik Jensen, Noreg 2002, 105 min.

Leygardagur 08. **kl. 21.00**
Prix Føroyar 2003, 5 umfar. Í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

Sunnudagur 09. **kl. 16.00**
Rútmiskur musikkskúladagur. Konsert

Týsdagur 11. **kl. 09-15.00**
Grundlógarráðstevnan 2003. Fyriskipari er Dennis Holm
Mikudagur 12. **kl. 09-15.00**
Grundlógarráðstevnan 2003. Fyriskipari er Dennis Holm
Hósdagur 13. **kl. 09-15.00**
Grundlógarráðstevnan 2003. Fyriskipari er Dennis Holm

Sunnudagur 09. **kl. 17.00**
Orfeus í skúlanum í **Trongisvági**. Johannes Andreasen (FO) soloklaver. Spæld verða verk eftir eldri klassiskt tónaskald og nýggjari norðurlendskur tónleikur

Mikudagur 12. **kl. 19.30**
Orfeus. Johannes Andreasen (FO) soloklaver. Spæld verða verk eftir eldri klassisk tónaskald og nýggjari norðurlendskur tónleikur

Leygardagur 15. **kl. 15-18.00**
Móðurmálslærarafelagið heldur fund

Leygardagur 15. **kl. 21.00**
Prix Føroyar 2003. (Hetta umfarið er kapping millum 2-arar) í **Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

Sunnudagur 16. **kl. 16.00**
Havnarkórið, konsert. Framført verður Elias Oriatoriið eftir Bach

Leygardagur 22 **kl. 16.00**
Grindamannafelagið heldur fund

Sunnudagur 23. **kl. 16.00**
Tórshavnar Manskór. Konsert

Mánadagur 24. **kl. 19.30**
Brúkarasamtakið skipar fyri almennum tiltaki

Sunnudagur 30. **kl. 16.00**
Konsert v/ Verkætlan Musikkskúlaskipanin og Føroya Symfoniorkestur

Broytingar í skránni kunnu koma fyri.
Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.
Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

Sosialurin

Tann internationala Bachterapeut útbúgvingin

Skeið í Dr. Bach blómuremedium.

Skeið nr. 1 verður 12.-13. apríl um nóg nógv tekna seg.

Skeið nr 1. er eitt 2 dagar skeið fyri øll, ið ynskja at læra um Dr. Bachs blómu remedier. Á skeiðinum lærir tú um Dr.Bachs 38 blómu remedier sum kunnu hjálpa tær við kensluligum óbalansum. Hvørt remedie er til eina serstaka kenslu.
Tú lærir hvussu tú kann seta tey røttu remedieni saman.

Aftaná skeið 1. dugir tú at geva tær og tínum nærmastu Dr. Bachs remedier.

Skeið 1. er eisini fyrsti partur av Bachterapeut-útbúgvingini, um tú hevði ynskt at lært meir.

Skeið 2 og 3 er um tú vil arbeiða fakliga sum Bachterapeutur.

Prísir
Skeið 1: 1.800 kr.

Skeið leiðari:
Susanne Løfgren
Polaris Centret, DK.
www.bachs-blomsterremedier.dk

Vil tú vita meira, kann tú seta teg í samband við

Marjun Samson
tlf 457860 ella 265913 aftaná kl 18.
Skeið adr.: Undir Klakki 51 · Klaksvík

Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Ársaðalfundur Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag verður í Eiriksgarði í Dali fríggjakvøldið 21. mars kl. 19.30. Aftaná verður hugnaløta við onkrum til matna og við luttøku av tingfólki floksins.

Skrá sambært lógum felagsins.

Nevndin

Aðalfundur

Alzheimerfelagið hevur aðalfund tann 30. mars í MBF-húsinum.

Skrá samb. lógum felagsins.

Mál til viðgerðar á fundinum skulu sambært viðtøkum felagsins verða nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin.

Nevndin

Ph.D.-ritgerð góðkend til verju á Fróðskaparsetri Føroya

Fríggjadagin 21. mars 2003 fer Erland Viberg Joensen, cand. mag. at verja Ph.D.-ritgerðina »Lossingarmenn í Havn« við Fróðskaparsetur Føroya.

Í dómsnevndini hava sitið Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri, Ph.D., Jonathan Wylie, professari, Ph.D., við Massachusetts Institute of Technology og Elisabeth Vestergaard, granskingarleiðari, Ph.D., við European Science Foundation í Strasbourg.

Sjálv verjan, sum er almenn, fer fram í høllini á Føroya Sjómansskúla. Byrjað verður klokkan 13.00.

Ritgerðin »Lossingarmenn í Havn« liggur alment frammi á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum frá fríggjadegnum 28. februar 2003. Hon verður eisini at fáa til keyps í bókabúðunum í næstum. Føroya Fróðskaparfelag gevur bókina út sum Supplementum nummar XXXVII til Fróðskaparrit. Bókin fer at kosta 280,- krónur.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J. C. Svabosgøta 14,
100 Tórshavn

Maskinmeistarafelagið

Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund á Hotel Hafnia leygardagin 15. mars kl. 14.

Skrá sambært lógini.

Nevndin

Kvikkeyp í Hornabø

Søkt verður eftir fólki yvir 18 ár til kvøld og vikuskiftisvaktir.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 212490.

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

Tilmelding

til Útibarnagarðin í Æðuvík

– eitt øðrvísi ansingartilboð –

Tey, ið ætla at søkja um upptøku í Útibarnagarðinum í ár, fyri børn í árganginum 1997–1998, mugu lata umsókn inn áðrenn 1. apríl.

Børnini eru nógv úti í náttúruni, har dentur verður lagdur á at nýta nógvu møguleikarnar, ið náttúran og tær ymisku árstíðirnar hava at bjóða.

Góðir møguleikar eru eisini fyri innandura aktivitetum í hugnaligu hølunum, tá veðrið ikki er til vildar.

Útibarnagarðurin Víkin í Æðuvík hevur pláss fyri 22 børnum í aldrinum 5 til 7 ár.

Útibarnagarðurin Víkin
645 Æðuvík
tlf. 44 9998 - 21 4306

Søkt verður eftir

LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

at byrja sum skjótast

Læran umfatar: Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

Vit vænta: at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

P/F Hjá Fróða
Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

Team 85 358000

ROVER 620 Si TIL SØLU

Sum nýggjur, Rover 620 Si, svartur, bert koyrt km. 7.550, aircondition, alufelgur, fjarstýrt centrallás, el rútar, el spegl við hita, CD anlegg, mjørkalyktir v.m.

Prísur kr. **200.000,-**

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15
Tlf. 310600

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Skeið í byggijura

Um nóg nógv tekna seg skipa Arkitektafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Føroya Byggifrøðingafelag, Byggiharrasamtak Føroya og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag fyri skeiði í byggijura.

Skeiðið er ætlað handverksmeistarum, byggiharrum, teknikarum, byggifrøðingum, verkfrøðingum, arkitektum, løgfrøðingum og banka- og sparikassafólkum, sum fáast við bygging.

Innihaldið á skeiðnum
Á skeiðnum verður undirvíst í løgtingslógini um útbjóðing v.m. og í avtalugrundarlagnum millum byggiharrar og arbeiðstakarar ABF 92.

Á skránni eru m.a. hesi evnir:
- Avtalugrundarlagið
- Trygdir og trygging
- Útinning av enterprisuni
- Gjaldskyldan hjá Byggiharrum
- Tíðarfreistleingjan og seinkan
- Handan av arbeiðnum
- Manglum

Undirvísari
Undirvísari á skeiðnum verður Peter Andersen frá Håndværksrådet.

Skeiðstaður og kostnaður
Skeiðið verður á Hotel Norð tann 3. og 4. apríl 2003. Kostnaðurin fyri at luttaka er kr. 3500,- fyri hvønn íroknað vistarhald.

Tilmeldingarfreist & -stað
Freistin at tekna seg til skeiðið er **14. mars 2003** í Vinnuhúsinum á tlf. 311864 ella á teldupostadressu: industry@industry.fo

Skrivstovufólk til hálvdagsstarv

Søkt verður eftir fólki til hálvdagsstarv. Starvið umfatar bókhald, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Førleikakrav
- **Bókhaldsroyndir**
- **Kunnleika til Navision og Word**
- **At viðkomandi er nærlagdur og hevur góð samstarvsevni**

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi, í seinasta lagi 14.03.03

REVISIÓN
Stoffalág 4 • 100 Tórshavn • Tlf. 316037 • Fax. 319852

Sp/f Revisión veitir tænastur sum fevna um grannskoðan, bókhald, roknskap, skatt og ráðgeving hesum viðvíkjandi. [illegible]

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Verkfrøðingur

til plan- og prosjektdeildina

Starv sum leiðari av plan- og prosjektdeildini hjá Landsverkfrøðinginum er leyst at søkja.

Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.

Til rætta fólkið kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga menn-andi og við góðum arbeiðsumstøðum.

Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri, eru hesar:

- Gera ætlanir fyri landsvegakervinum
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøkum
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

Førleikakrøv
Søknast verður eftir verkfrøðingi við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki, og er neyðugt, at umsøkjarin dugir at samskipa og leiða arbeiðið á deildini.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

Setanarviðurskifti
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til

Landsverkfrøðingin
Postboks 78
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. mars 2003. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til vegadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 311333, lokal 213 (e-postur: finnleif@lv.fo).

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480